FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA
UNIVERSITY OF THE FAROE ISLANDS

# Leiðbeining til umsóknarblað um upptøku á MA í føroyskum 2021

# á Fróðskaparsetri Føroya

<u>Les leiðbeiningina væl, áðrenn tú fyllir umsóknarblaðið út. Skriva týðiliga, helst við spjaldrastavum</u>

MA-útbúgving í føroyskum veitir kunnleika á høgum akademiskum stigi í vísindaligum lærugreinum í føroyskum. Útbúgvingin mennir evnini hjá teimum lesandi til kritiska støðutakan og sjálvstøðugt vísindaligt arbeiði. Námsevnið er føroyskt mál og føroyskar bókmentir. Undirvísingin er skipað í lestrarevni, har ið tann lesandi velur millum tey evni, sum eru í boði, ella kann seta saman sjálvlestrarevni (tilsamans 80 ECTS). Endað verður við eini MA-ritgerð (40 ECTS). Tilsamans 120 ECTS.

Áherðsla verður løgd á dýpdarkunnleika um føroyskt mál og bókmentir. Harumframt verður dentur lagdur á at menna førleikar at nýta viðkomandi vísindalig hugtøk, háttaløg og ástøði kritiskt. Útbúgvingin er granskingargrundað og miðar ímóti gransking, undirvísing og miðla- og mentanarvirksemi á høgum førleikastigi. Fyri at verða upptikin til MA-lestur krevst útbúgving á bachelorstigi ella á øðrum hægri stigi við góðum úrsliti.

*Umsøkjarar við góðum BA-prógvi í øðrum málum og bókmentum kunnu verða upptiknir eftir hóskandi treytum, sum verða ásettar nærri í hvørjum einstøkum føri. Lærarar á deildini og gestalærarar bjóða fram lestrarevni, sum studentarnir velja ímillum.

MA í føroyskum kann eftir umsókn skipast sum MA í føroyskum máli ella í føroyskum bókmentum.

*) Omanfyri nevndu umsøkjarar skulu venda sær til lestrarvegleiðingina, áðrenn teir søkja. Adressa: FMD@setur.fo

1. **Persónsupplýsingar**

   *P-tal*: Um tú hevur føroyskt p-tal, verður tað skrivað her. Hevur tú ikki tað, skrivar tú føðingardag, mánað og ár í teir fyrstu 6 rútarnar til p-tal. Teir 3 síðstu rútarnir eftir strikuna skulu so standa tómir.

   *Fornavn*: Her skrivar tú fornavn/nøvn og millumnavn.

   *Eftirnavn*: Her skrivar tú eftirnavnið. Minst til, at øll hava bert <u>eitt</u> eftirnavn.

   *Bústaðurin* er tað staðið, har ið tú nú býrt. Flytur tú, er tað av týdningi, at tú beinanvegin boðar Fróðskaparsetri Føroya frá nýggja bústaði tínum.

   *Ríkisborgaraskapur*: Upplýst ríkisborgaraskap tín.

   *Teldupostur*: SKAL fyllast út.

2. *Skerdur førleiki*: Fróðskaparsetrið ynskir, at tú gert vart við møguligar skerdar førleikar (t.d. orðblindni, niðursetta hoyrn ella sjón, ella sálarligar avbjóðingar), soleiðis at tíð er til at gera neyðugu fyrireikingarnar til tess at tryggja øllum lesandi á Fróðskaparsetri Føroya somu møguleikar frá lestrarbyrjan.

3. **Upptøkugrundarlag**

   Her skrivar tú árið, tá ið tú tókst prógv, og heitið á útbúgvingini. Eisini skrivar tú nummar á fylgiskjalið, prógvið, sum skal sendast við.

   Tey, sum søkja um upptøku til MA í Føroyskum, skulu duga at tosa, lesa og skriva føroyskt og kunna skjalprógva tað.

   <u>Danskt og enskt</u>

   Á øllum útbúgvingunum innan hugvísindi er í minsta lagi neyðugt at duga at lesa danskt og enskt.

**4. Undirskrift - MINST TIL HENNARA!**

Umsóknin verður einans viðgjørd, um hon er dagfest og undirskrivað.

Tú skalt sjálv/ur dagfesta og undirskriva umsóknina. Hevur tú ikki møguleika til tað, kanst tú geva eina fulltrú til ein annan persón, sum so hevur fulltrú til at søkja tína vegna. Henda fulltrú skal sendast saman við umsóknini. Oyðublað til fulltrú er síða 2 í umsóknarblaðnum.

**Samtykki**

Tá tú søkir um upptøku til lestur á Fróðskaparsetrinum, verður tú biðin um at geva samtykki til, at vit kunnu viðgera upplýsingarnar, ið tú sendir okkum. Hetta er neyðugt til tess, at vit kunnu viðgera umsókn tína. Minst til at seta kross í teigin. Um tú ikki setur kross í teigin, kunnu vit ikki viðgera umsókn tína.

Les nærri um, hvat Fróðskaparsetrið kann nýta upplýsingarnar til á www.setur.fo/samtykki.

**Umsóknarfreistin til MA í føroyskum er:**

**1. juli 2021 á midnátt**

Umsóknin kann sendast teldutøk til:

lestur@setur.fo

ella við Posta til:
Fróðskaparsetur Føroya
J. C. Svabos gøta 14,
Postsmogu 272,
FO-110 Tórshavn

Eisini ber til at leggja hana í postkassan á Lestrarskrivstovuni, J. C. Svabos gøtu 7.

*Studni* vil vita, um tú fert at søkja um ÚS lestrarstuðul. Fyri at fáa ÚS skal ein vera fulltíðarlesandi. Eisini er krav um, at tú ikki ert meira enn eitt ár seinkað/ur eftir lestrarætlanini fyri útbúgvingina.

Boð um upptøku verður sent øllum umsøkjarum í seinasta lagi fríggjadagin **9. juli 2021**.

Játtan fyri, at umsøkjari tekur við lestrarplássinum, skal vera Setrinum í hendi í seinasta lagi sunnudagin **1. august 2021 á midnátt**.

**Hjálp í sambandi við upptøku**

Eru spurningar í sambandi við umsóknarblað ella upptøku annars, ber til at venda sær til Lestrarskrivstovuna á tlf. 352520 ella umvegis t-post til LSS@setur.fo. Spurningar viðvíkjandi útbúgvingum kunnu setast útbúgvingarleiðarum og lestrarvegleiðarum, sí nærri kunning á heimasíðuni www.setur.fo.